# Varðborg seld til Oyrar, Ólavur Hvíti til Gibraltar

**Tað er skipsmeklaravirkið, MARETEC á Argjum, sum hevur skipað fyri sølunum**

SKIPASØLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri vórðu skipini, Varðborg og Ólavur Hvíti, seld.

Tað er skipsmeklaravirkið á Argjum, MARETEC, sum hevur skipað fyri sølunum.

Ólavur Hvíti, sum P/F Thor í Hósvík átti, er seldur til eitt felag í Gibraltar. Ætlandi fer skipið til fiskiskap á leiðunum úti fyri Senegal. Tveir føroyingar vóru við á longu leiðini niður til Gibraltar.

Ísfiskatrolarin, Varðborg, sum felagið Stjørnan í Leirvík, átti, er seldur O.C. Joensen á Oyri.



*Varðborg er seld til Oyrar…*



*… og Ólavur Hvíti er seldur til Gibraltar*

# Hugnaløta og vinabýarstevna í Leirvík

**Í samband við fyrireikingarnar til vinarbýarstevnu, sum verður í Leirvík, 24.-26. juni, skipar Norrøna Felagið í bygdini fyri hugnaløtu í skúlanum í Leirvík týskvøldið**

HUGNALØTA OG VINARBÝARSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í summar fáa leirvíkingar vitjan av umleið 70 norðurlendingum, sum koma til Leirvíkar at halda stevnu.

Í døgunum, 24.-26. juni, verður nevniliga vinabýarstevna í Leirvík. Hetta er ein stevna, ið vinabýirnir, sum Leirvík hevur í Norðurlondum, skiftast um at hava – og í ár er tað so Leirvík, sum skal skipa fyri stevnuni.

**Hugnaløta**

Tað er í hesum sambandi, at Norrøna Felagið í Leirvík skipar fyri hugnaløtu skúlanum týskvøldið, 10. mai. Á skránni verður eitt nú felagssangur við harmoniku, drekkamunnur og lagkøka, og síðan verður tosað um norðurlendskt samstarv og um vinabýarstevnuna, sum verður í summar.

- Vit heita á bygdarfólkið um at møta fjølment, soleiðis at vit fáa fyrireikað okkum á bestan hátt til at taka ímóti teimum umleið 70 gestunum, sum koma higar at vitja okkum úr hinum norðurlondunum.

Norrøna Felagið í Leirvík sigur, at høvið verður eisini á hugnaløtuni at tekna seg til at hýsa onkrum av norðurlendsku gestunum.



*Nakrir av framleiðslutøkningunum á Tekniska skúla, sum høvdu framløgu av sínum projektum, 19. apríl. Eitt av projektunum snúði seg um ljósleiðarar, sum eitt nú kunnu nýtast til at lýsa upp í tunlum*

Mynd: Jens Kr. Vang

# Projektir til vinnulívið

**Útbúgvingin sum framleiðslutøkningur við Tekniska skúla er ein tvey ára framhaldandi útbúgving**

TEKNISKI SKÚLIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin, 19. apríl, løgdu næmingarnir í framleiðslutøkni við Tekniska skúla fram síni projektir.

Nøkur av projektunum hjá næmingunum eru ógvuliga áhugaverd og kunnu saktans gerast viðkomandi fyri vinnuna.

Eitt nú hava næmingarnir framleitt eina maskinu, sum avsaltar saltfisk. Mett verður, at hetta kann gerast ein maskina, sum vinnan kemur at hava áhuga fyri.

Eitt annað projekt, ið næmingarnir við Tekniska skúla hava gjørt, snýr seg um at nýta ljósleiðarar til at lýsa upp í eitt nú tunlum og aliringum.

**Útbúgvingin**

Útbúgvingin, sum framleiðslutøkningur, er ein tvey ára framhaldandi útbúgving, sum í Danmark hevur heitið, "produktionsteknolog".

Útbúgvingin á Tekniska skúla tekur tvey ár og fevnir eitt nú um hesar lærugreinar; maskinkonstruktión, framleiðslutøkni, framleiðslu-og virkisleiðslu, leiðsla-samstarv, støddfrøði/ alisfrøði, teldulæra (mest CAD-forrit), virkisbúskapur og automatión.

Upptøkukrøvini eru; handverksútbúgving í viðkomandi yrki, studentsútbúgving, SIT 2. støðisár, HIF, HH, HT og HF.

Seinasta freist at søkja á Tekniska skúla sum framleiðslutøkningur var í gjár, mánadagin, 9. mai.

Skúlin byrjar aftur, 15. august 2005.

# Trý skip við svartkjafti

SVARTKJAFTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaði Christian í Grótinum umleið 2.000 tons av svartkjafti til Havsbrún í Fuglafirði.

Á virkinum vistu tey mánadagin at siga, at tvey onnur skip eru væntandi næstu dagarnar, Jupiter og Norðborg.

Hvør av hesum verður hin fyrri, var ikki greitt, tá ið vit frættu, men væntandi er, at Jupiter og Norðborg hava umleið 2.000 tons í part, tá ið túrurin er av, og lagt verður til bryggju.



*Næstu dagarnar koma eisini Jupiter (mynd) og Norðborg á Fuglafjørð við umleið 2.000 tonsum av svartkjafti í part*

Mynd: Vilmund Jacobsen